## Spentur pápi

- Eg og mínir liðfelagar plagdu á sinni ofta at flenna eftir gomlum monnum, sum gingu ørir av spenningi uppi í bønum og hugdu, men nú eri eg ein av teimum. Hetta hevur verið óhugnaliga spennandi. At NSÍ hevur gjørt eitt gott miðvíst ungdómsarbeiði, síggja vit her í dag, segði fyrrverandi NSÍ-spælarin Abraham Løkin eftir FM-sigurin. - Tað var spennandi til dystir, tá man sjálvur spældi, men hetta er ræðuligt. Tað verður bara enn meira spennandi av at hava ein son á liðnum eisini.



## – Eg eri nakað so glaður

Jónhard Frederiksberg var ein av nýggju spælarunum á NSÍ-liðnum í ár. Jónhard hevur annars spælt á Skála, og har var eisini um reppið, at hann gjørdist føroyameistari. Sunnudagin hendi tað so umsíðir hjá álopsspælaranum. - Eg eri ovurfegin, hetta er mítt fyrsta meistaraheiti, og eg eri nakað so glaður júst nú, segði Jónhard



*Jákup Mortensen hevur tikið mangt takið fyri NSÍ, og sunnudagin kundi hann fegnast um føroyameistaraheitið hjá sínum felag*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Setti gongd á fótbóltin í NSÍ

**- Vit hava gjørt eitt megnar arbeiði við ungdómin her, og tað er av størsta týdningi, at vit halda fram við tí, sigur Jákup Mortensen, sum hevur verið við frá byrjan í fótbóltinum hjá NSÍ**

**FØROYAMEISTARI**
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Jákup Mortensen hevur verið millum teir ídnastu í fótbóltinum í NSÍ. Tað er ikki á vøllinum, at hann hevur gjørt um seg men uttanfyri vøllin, har hann hevur skipað fyri og verið formaður í nógv ár.

Nú er Jákup Mortensen heiðurslimur í NSÍ, og sunnudagin kom so endiliga tann stóra løtan, tá ið NSÍ setti seg á fótbóltstrúnuna í Føroyum.

- Eg kom higar í 1969, og tá so vøllur varð bygdur í 1973, fór eg í gongd við at venja eitt dreingjalið, og longu árið eftir vórðu vit næstbestir, beint aftanfyri TB, greiðir Jákup frá.

- Eg haldi at veruliga framgongdin byrjaði, tá vit framdu tað stig at sundurskilja fótbólt, hondbólt og kappróður. Í 1990-unum byrjaðu sjónlig framstig at koma undan kavi, og so nú í dag, aftaná øll hesu árini, kann felagið við Løkin krúnast meistarar í føroyskum fótbólti.

- Vit hava gjørt eitt megnar arbeiði við ungdómin her, og tað er av størsta týdningi, at vit halda fram við tí, sigur Jákup Mortensen.

Millum teir, sum hava mynda Formulahópin hjá NSÍ í ár, er unglingaspælarin Jann Martin Mortensen, sum er abbasonur Jákup.




NSÍ-VB/Sumba 3-1 (2-1):

# Nú hevur NSÍ

*NSÍ*

*VB/Sumba*

**Søguliga staðfestingin av fyrsta FM heitinum var framman fyri stórari fjøld og treiskum suðuroyingum, sum avgjørt høvdu heiður av teirra avriki**

**NSÍ-VB/SUMBA**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

NSÍ er føroyameistari. Í síðsta heimadystinum í fyrsta FM árinum var tað ongantíð FM snitt yvir avrikinum. Eftir steðgin var tað væl frægari, enn tað hevði verið.

Men botnstøði og FM avrik høvdu einki at siga henda dagin, tá ið veðrið ikki var nakað serligt, og tá ið Ransin Djurhuus bríkslaði fyri síðstu ferð, oysti regnið niður.

Myrka veðrið og regnið helt tó ikki FM fagnaðinum aftur. Rakettir lýstu upp, og skotini geltu. 50 ára gamla NSÍ hevur bíðað eftir fyrsta FM heitinum, síðani teir í 1976 fyrstu ferð royndu seg í fremstu røð, og nú var fagnaðurin stórur. Tað stendur svart upp á hvítt, at NSÍ er meistari!

Við avrikunum í 25 teimum fyrstu umførunum í huga var ilt at ímynda sær, at tað skuldi kiksa, tá ið síðstu stigini skuldu vinnast.

Bæði tí NSÍ avrikini hava verið ógvuliga støðug, og tí at úrtøkan hjá VB/Sumba ikki hevur verið nakað serlig.

Fyrsta løtan gekk, sum tað kundi roknast við. Eftir tólv minuttir var 2-0. Einar Hansen og Hjalgrím Elttør áttu í vinstru uppspælið til fyrsta málið, sum Jónhard Frederiksberg skoraði.

Jónhard var undan kappingarbyrjan keyptur yvir um fjørðin fyri at vera við til at skjóta málini, sum skuldu til fyri at gera NSÍ til meistara. Leingi gekk tað striltið hjá arbeiðssama skálamanninum, men nú fram ímóti kappingarenda er rættuliga gloppið.

Seinna málið var sera óheppið sjálvmál. Eftir langa framlegging og kroystur av Christian Høgna Jacobsen royndi óføri verjuspælarin Dimitrije Jankovic at lyfta aftur til málverjan, Vlada Filipovic, men ólukkutíð fyri teir báðar og VB, so var málverjin runnin fram úr málinum, og tískil sigldi bólturin yvir Vlada og í málið.

2-0 og harvið tóktist vera lagt upp til stóran heimasigur og eyðmýking við gestunum sum statistum.

### Fínt farvæl

Men soleiðis tørnaði tað ikki út. Síðsta hálva tíman av 1. hálvleiki vísti VB/Sumba fínt avrik.

Tað kann gott vera, at FM málstrikan í Runavík og B36 pínslan í Streymnesi bar gummibein við sær til teir gulu og svørtu. Men VB/Sumba spælararnir áttu stóran heiður fyri teirra hugburð og leikliga avrik.

Ferð eftir ferð vóru teir nógvir á mótstøðuhálvuni, og trígjar ella fýra ferðir vóru Jón K. Poulsen, Marco Moravic og aðrir vístu tyngd í álopsspælinum, og uppspælið riggaði væl betri, enn tað kundi ímyndast, at absolutta botnliðið kundi megna ímóti meistaraliðnum.

Men soleiðis var tað, og miðskeiðis í 1. hálvleiki kom spenningur í aftur, tá ið Marco Moravic var framman fyri annars tryggu heimaverjuna og stýrdi innleggi frá Jón K. Poulsen í høgru í meskarnar aftanfyri Jens Martin Knudsen.

Og hevði tað ikki verið, tí Jens Martin var so framúr kringur millum NSÍ stólparnar, so kundi tað væl havt lagað seg soleiðis, at VB/Sumba hevði havt javnað.

Farvælið hjá skjótt fyrrverandi Formula liðnum var av sovornum slagi, at tað eiga at vera góðar vánir

